# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Anna Maria Mikkelsen 100 ár:

# 100 ferðir takk fyri

**Rættur hátíðardámur var í Gøtu týsdagin 31. mai í samband við at Anna Maria Mikkelsen í Syðrugøtu fylti 100 ár. Umleið 500 fólk vóru til føðingardagin, sum varð hildin í Filadelfia við Gøtugjógv**




FØÐINGARDAGUR

*Myndir: Bárður Lydersen*

100 ferðir takk fyri, segði Anna Maria Mikkelsen, ella Mia á Støðini, sum hon verður rópt, tá Jóannes Eidesgaard løgmaður heilsaði upp á hana og ynskti henni tillukku við 100 ára føðingardegin.

Umleið 500 fólk vóru til føðingardagin, sum varð hildin í Filadelfia við Gøtugjógv. Umframt bygdarfólk, familju og kenningar vóru eisini umboð fyri fleiri almennar stovnar. Av teimum hildi hesi talu: Jóannes Eidesgaard. løgmaður, Hans Pauli Strøm. landsstýrismaður, og Petra Jónsdóttir, stjóri á Almannastovuni. Eisini vóru fleiri onnur sum hildu talu.

Anna Maria var sera væl nøgd og takksom fyri dagin. Alt eydnaðist væl og veðrið var av tí besta. Mia er ikki tann einasti í familjuni sum hevur fylt hundrað ár. 19. 1977 fylti mamma hennara, Jóhanna, eisini hundrað.

Her hava vit nakrar myndir frá hátíðarhaldinum.













